

***VÓN Í KRÍGSTÍÐ*** *"Pápi mín stríðist á hermótinum. Tá hann var heima, segði hann mær frá Gudi og lærdi meg at biðja og tók meg við í kirkju. Eg eri harmur, ikki at hava hann við mær nú. Ein dagin varð eg boðin til barnajólahald í kirkjuni. Tey fortaldu okkum um føðing Jesusar, spældu spøl, bóðu og takkaðu Gudi. Eg føldi tað sum um pápi mín var hjá mær og bað saman við mær. Síðani fingu vit eina skógvaeskju fulla við gávum, eg skilti tá, at Gud hevði umsorgan fyri mær, tá ið eg kendi meg einsamallan. Eg fari at biðja meira um, at pápi mín skal koma heim aftur skjótt."*

– **Maksim Gres'ko, 9 ár, Ukraina**

*Franklin Graham, Samaritan's Purse:*

## "Milliónir av børnum kring knøttin ....

..eru ávirkað av hesum einfaldu gávunum í skógvaeskjuni. Ein eskja ávirkar ikki bara barnið, sum fær eskjuna, men alla familjuna. So halt áfram at pakka skógvaeskjuna!

Takk fyri og má Gud signa teg".



## Eitt av heimsins stórstu jólatiltøkum

Hvørt ár verða meira enn 10 milliónir skógvaeskjur latnar børnum í meira enn 120 londum. Sjálvboðin fólk og felagsskapir í USA og fleiri evropeiskum londum, íroknað Føroyar, savna eskjurnar. Øll, einstaklingar sum felagsskapir, kunnu lata inn skógvaeskju. Børnini fáa eskjurnar so vítt gjørligt um jólini. Har møguleiki er fyri tí, verður bóklingur við bíbliusøgum latin børnunum á teirra máli.

## Hvat er Christmas Child?

Christmas Child er eitt tiltak, sum seinastu árini hevur glett børn, ið ikki hava tað so gott, við at geva teimum eina skógvaeskju. Ein skógvaeskja broytir ikki heimin, MEN hetta hevur havt alstóran týdning fyri mong børn kring heimin, síðani tiltakið byrjaði í 1993. Operation Christmas Child er partur av vælgerandi felagsskapinum Samaritan's Purse, sum eisini skipar fyri øðrum hjálpararbeiði millum neyðstødd.

Franklin Graham stjórnar vælgerandi felagsskapinum Samaritan's Purse, www.samaritanspurse.org, sum m.a. skipar fyri tiltakinum Operation Christmas Child.

## Um tú ivast í onkrum, kanst tú ringja til:

**Vágar:** Osla: tlf. 257677
**Streymoy:** Lissi: tlf. 217274, Anna: tlf. 316519/282372
Turið: tlf. 518221, Marin Elisabeth: tlf. 286367
**Eysturoy:** Miriam: tlf. 589000, Hanna: tlf. 723560
**Norðoyggjar:** Erika: tlf. 217869
**Sandoy:** Helena: tlf. 278702 og 361776
**Suðuroy:** Heidi: tlf. 267894

## Frætta tit aftur frá børnunum?

Tú kanst leggja eitt bræv til barnið og eina mynd av tær sjálvum ella tínari familju í eskjuna. Tað ber til at taka brævið niður á heimasíðuni undir "Tilfar". Ikki skriva nakað átrúnaðarligt ella politiskt í brævið. Um tú skrivar navn og bústað í brævið, hevur barnið, sum fær tína skógvaeskju, møguleika at skriva aftur til tín. Fleiri føroysk børn hava fingið brøv frá børnum, ið hava fingið skógvaeskju úr Føroyum.



## Her skulu eskjurnar latast inn:

Umleið 50 samkomur, meinigheitshús, kirkjur, stovnar, dagtilhald, felagsskapir og onnur kring landið skipa fyri innsavning av skógvaeskjum.

**Skanna kontaktlistan**

*Ella far á: christmaschild.fo/vegleiding*

**Seinasta freist**
**25. OKTOBER 2026**

# Soleiðis pakkar tú skógvaeskjuna



# TÁ IÐ TÚ FYRIREIKAR TEG AT PAKKA TÍNA SKÓGVAESKJU...

**Seinasta freist**
**25. OKTOBER**

## SKÓGVAESKJA

**1** Finn eina tóma skógvaeskju og ger av, um tú pakkar til gentu ella drong og hvønn aldursbólk, eskjan er ætlað til. Tú kanst gott prýða eskjuna við gávupappíri. Klistra merkið, ið vísir hvat kyn og hvønn aldursbólk, eskjan er ætlað til. Merkið er á faldaranum ella at finna á okkara heimasíðu.

## SERSTØK GÁVA

**2** Vel gávur, tú heldur børnunum fer at dáma. T.d. eina fitta dukku, ein fótbólt við pumpu, eina bamsu ella ein lastbil.

## AÐRAR GÁVUR

**3** Skúlatilfar, heilsurøkt, onnur ting sum: Keppar, handskar, turruklæði, hosur, húgvur o.a.

## GER OKKURT PERSÓNLIGT

**4** Skriva eitt bræv og legg tað saman við einari mynd. Minst til at biðja fyri barninum, sum fær tína gávu.



## MINST TIL PENINGIN

**5** Vinarliga legg ein brævbjálva við 40 kr. í oman á eskjuna ella flyt peningin á konto 9181-1403917

## LAT ESKJUNA INN

**6** Á heimasíðuni sæst, hvar eskjurnar kunnu latast inn. Seinasta freist at lata eskjuna inn er:

**25. OKTOBER 2026.**




## BEST ER, UM OKKURT SERSTAKT ER Í HVØRJARI ESKJU!

**Eisini ber til at keypa skógvaeskju á netinum. Far inn á www.christmaschild.fo/tilfar/keyp-online**

Ikki koyra í eskjurnar: Brúktar ella skaddar lutir. Onnur klædnapløgg enn húgvu, vøttir/handskar, turrikløð og hosur. Leikur, ið kunnu setast í samband við kríggj s.s. byrsur, knívar og hermenn. Fræ, slikk, sjokulátu ella annan mat. Tannkrem, ella annað flótandi krem ella sápu. Heilivág. Átrúnaðarligan ella politiskan lesna. Hvassar ella viðkvamar lutir. Bøkur, har meginparturin av innihaldinum er skrivað orð.

**VEGNA TOLLFORÐINGAR KUNNU TANNKREM, SÁPUR OG SLIKK IKKI LONGUR KOYRAST Í SKÓGVAESKJURNAR!**

# Brúka hesi klistrimerkini

Um tit ynskja fleiri, kunnu tey takast niður á www.christmaschild.fo

**Seinasta freist: 25. oktober 2026**

Mark the correct age category:
2-4 Years Old
5-9 Years Old
10-14 Years Old
GIRL
Samaritan's Purse® Operation Christmas Child

Mark the correct age category:
2-4 Years Old
5-9 Years Old
10-14 Years Old
BOY
Samaritan's Purse® Operation Christmas Child